

www.oljan.fo

**Jan Müller** 22 - 05 - 2012

# G8-londini brúka oljuna ímóti Iran

Á fundinum í Camp David nú um dagarnar samdust londini í G8-bólkinum um at forða fyri, at ov lítil olja verður á marknaðinum, tá tiltøkini ímóti iranska oljuútflutninginum fáa fulla ávirkan. Í einari felags fráboðan siga leiðararnir, at teir seinastu mánaðirnar hava tað verið trupulleikar við at fáa nóg mikið av olju á marknaðin. Teir siga, at trupulleikin hevur verið veksandi, og tað er ein hóttan ímóti búskaparligum vøkstri. Ríkis- og stjórnarleiðararnir í G8-londunum skriva, at teir vænta framvegis órógv í oljusøluni, samstundis sum eftirspurningurin fer at veksa. Tí fara londini at halda eitt vakið eyga við gongdini og eru til reiðar at biðja Altjóða Orkustovnin IEA fremja hóskandi tiltøk fyri at tryggja, at marknaðurin fær ta neyðugu oljuna til rætta tíð. Tað er ikki greitt, um hetta merkir, at londini fara at koyra partar av sínum strategisku oljugoymslum út á marknaðin, og sambært einum ráðgeva í Hvítu Húsunum tosaðu leiðararnir ikki um, hvat skal henda á marknaðinum, fyri at G8-londini skulu seta tiltøk í verk. Amerikanski forsetin, Barack Obama, segði í Camp David, at G8-londini vóru samd um at halda fram við handilsligum tiltøkum og diplomatiskum trýsti ímóti Iran. ES-londini hava samtykt, at tey innflyta ikki meiri olju úr Iran eftir tann 1. juli fyri at noyða landið at gevast við sínum kjarnorkuætlanum.